# Skrivstovufólk til Stuðulsskipanina fyri vaksin og Deildina fyri sinnisveik

**Stuðulsskipanin fyri vaksin og Deildin fyri sinnisveik søkir eftir fólki til skrivstovuna.**



**Arbeiðið hjá skrivstovufólkinum fevnir um:**
- At samskifta við tey, ið nýta skipanina
- At vera journalførari (Doculive)
- At uppdatera databasu (Access)
- At kanna og senda lønargjaldsumbønir til lønardeildina
- Kanna innkomnar lønarseðlar
- Kanna at rættar lønir eru útgoldnar
- At verða skrivari hjá leiðaranum
- Skriva fundarfrágreiðingar og lesa rættlestur
- Telefonavgreiðsla, heinta post o.a.
- Dagføra heimasíðu
- Málsviðgerð
- Fyriskipa fundir og evnisdagar

**Vit vænta, at tú hevur:**
- Skrivstovuútbúgving ella drúgvar royndir á skrivstovu
- Góðan telduførleika á brúkarastigi og teldukoyrikort
- Góð samstarvsevni

**Stuðulsskipanin fyri vaksin/Deildin fyri sinnisveik kann bjóða:**
- Ein ágrýtnan og eldhugaðan starvsfólkahóp við góðum huglag og umsorgan fyri hvørjum øðrum.
- Eitt vælvirkandi arbeiðspláss í støðugari menning

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøkið er Heimarøktin og Serforsorgin. Tænastustaðið er í løtuni skrivstovan hjá Stuðulsskipanini fyri vaksin/Deildini fyri sinnisveik, men tann, sum settur verður, kann vænta at skula arbeiða ein dag um vikuna á Meginskrivstovuni. Arbeiðstíðin er 32 tímar um vikuna. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran, Regin Johansen á tlf.nr. 354020

**Umsóknarfreistin er 7. apríl 2006 og umsóknir við prógvum og viðmælum skulu sendast til:**

Stuðulsskipanin fyri vaksin/Deildin fyri sinnisveik
Stílað: Regin Johansen
Løkjatún 1
160 Argir

Starvið verður sett 15. apríl 2006 ella skjótast til ber.

Stuðulsskipanin fyri vaksin og Deildin fyri sinnisveik fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita stuðul og umsorgan til sinnisveik, menningartarnað, seinheilaskødd og fólk við likamsbreki.

**Føroya Blindastovnur**

Íslandsvegur 10A
Boks 2074
FO-165 Argir

# Ergoterapeutur til Føroya Blindastovn

Á Føroya Blindastovni verður søkt eftir ergoterapeuti í fast starv frá 15. mai 2006 ella skjótast til ber.

Vit bjóða eitt spennandi og fjølbroytt starv við møguleika fyri ávirkan og mennan av arbeiðsuppgávunum, sum eru:

- Frálæra í ADL og mobility
- Roynd av hjálpartólum
- Heimavitjan og frálæra í nærumhvørvinum
- Frálæra í sambandi við skeið og kunnandi virksemi
- Luttøka/frálæra í skapandi virksemi
- Vegleiðing av øðrum fakbólkum

Vit sóknast eftir einum starvsfelaga, sum
- hevur góð samstarvsevni
- kann arbeiða sjálvstøðug/ur
- er skapandi og hevur hugflog
- hevur teldukunnleika á byrjunarstøði
- hevur koyrikort og helst egnan bil
- tekur ábyrgd

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Ergoterapeutfelagið og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við prógvum og CV skal vera okkum í hendi seinast mánadagin 10. apríl 2006.

Eru fyrispurningar til starvið, ert tú vælkomin at ringja á tlf. 31 82 22 og tosa við leiðaran.

**Føroya Blindastovnur er sjálvsognarstovnur**

**Við endamálsorðingini: „Hjálp til sjálvhjálp" verður virksemið á stovninum lagt til rættis eftir ynski og tørvi hjá einstaka brúkaranum, sum søkir ráðgeving orsakað av sjónbreki.**

**Stovnurin hevur verkstøð til ymiskt handaligt arbeiði. Eisini hevur stovnurin ráðgeving, sum vegleiðir í brúki av hjálpartólum og gevur frálæru í almennari dagligari lívsførðslu. Frálæran kann vera einsæris ella í bólki, skipað sum skeið.**





